FYLGI: LM-064/2022

LANDSVERK

Barna- og útbúgvingamálaráðið

Tórshavn, 7. Feb. 2023

Viðmerkingar til uppskot til Løgtingslóg um at um- og útbyggja eftirskúlan Rásina

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1 Orsakir til uppskotið
Í uppskotinum til løgtingslóg stendur:
"Nýggi bygningurin er 450 fermetrar til víddar."

Hetta kann rættast til:
Nýggi bygningurin er 566 fermetrar til víddar.

Grundgevingin fyri hesum er at teir 450 fermetrarnir sum eru komnir við her, eru byggistigið ið skal upplýsast kommununi í samband við umsókn um byggiloyvi. Meðan tað sum Rásin fær av nýggjum fermetrum við hesi útbyggingini og sum eigur at upplýsast í verklagslógini, er 566 fermetrar í brutto útrokning.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1 Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Í uppskotinum til løgtingslóg stendur:
"Frá 2019 til 2022 eru brúktar 1,65 mió. kr. til fyrireiking og projektering av verkætlanini. Játtaðar eru 4,5 mió. kr. í 2022, ið verða fluttar fram til 2023. Landsverk mælir til at írestandi útreiðslur fella soleiðis yvir ár: 12 mió. kr. í 2023, 12,35 mió. kr. í 2024, men annars verður verkætlanin framd sambært veittari játtan á fíggjarlógini."

Upphæddirnar 1,65 + 12 + 12,35 geva 26 mió. kr. Játtanin í 2023 kann broytast til 11 mió. kr. Sum so gevur 25 mió. kr. ið samsvarar við § 1.

Vinarliga

Sonni Seyer
Verkætlanarleiðari

Tinghúsvegur 5 // Postsmoga 78 // FO-110 Tórshavn // Tel. +298 340 800 // lv@lv.fo // www.landsverk.fo